UTTAN ÚR HEIMI

# Ófriðurin í Nigeria trýstir oljuprísin upp




*Shell hevur flutt fleiri av sínum starvsfólkum úr oljuøkinum í Nigerósanum eftir rán og burturflytingar*

*Mynd: Reuters*

**Oljuprísurin er aftur farin upp um 61 dollarar fyri tunnuna, og stendur ófriðurin í Nigeria við, fellur prísurin neyvan í bræði**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tær seinastu vikurnar hevur oljuprísurin verið fallandi, men áhaldandi ófriður í Nigeria hevur havt við sær, at fallið er steðgað, og at prísurin er á veg uppaftur. Í gjár kom hann upp um 61 dollarar fyri tunnuna, og marknaðarserfrøðingar siga við Aftenposten, at prísurin fer neyvan at fella aftur í bræði, tí ófriðurin í Nigeria fær neyvan enda enn á sinni.

Í gjár gjørdi Shell av at flyta fleiri av sínum starvsfólkum av oljuleiðunum har eysturi í Niger-ósanum, eftir at muslimskir uppreistrarmenn rændu og burturfluttu níggju fólk haðani seinasta vikuskiftið. Harafturat oyðiløgdu uppreistrarmenninir tvær oljuleiðingar.

Nigerisku myndugleikarnir, sum hava sent herin eftir uppreistrarmonnunum, siga, at talan er ikki um uppreistrarmenn, men brotsmenn og tjóvar, sum stjala og selja olju. Serfrøðingar siga, at ófriðurin í Nigeria er ein afturvendandi trupulleiki, sum lættliga kann vara eitt ár í hesum umfari.

– Eg vænti, at harðskapurin fer at standa við minst eitt ár afturat, segði marknaðarserfrøðingurin Tony Numan hjá Mitsubishi Corporation við BBC í gjár.

Á marknaðinum í London fór prísurin á Brentoljuni úr Norðsjónum upp á 61,40 dollarar, og í New York varð roknað við uppaftur hægri prísi.

# Kanna frakkan hjá Olof Palme

**Drápsmaðurin legði hondina á økslina á Palme, áðrenn hann skeyt. Tí skal frakkin DNA-kannast**

KANNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er ikki greitt, um nakað DNA-spor er á gamla frakkanum hjá Olof Palme, men tað serliga løgregluliðið, sum framvegis kannar morðið, sigur, at allir møguleikar skulu kannast.

– Eg havi verið í Linköping og tosað við umboð fyri ta kriminaltekniska rannsóknarstovuna, sum skal gera kanningarnar, sigur Stig Edqvist við Aftonbladet. Tað er hann, sum stendur fyri Palme-kanningunum. Sambært blaðnum er rannsóknarstovan í Linköping tann fremsta av sínum slagi í Svøríki, og fleiri av teimum fremstu svensku DNA-serfrøðingunum arbeiða har.

Svenska løgreglan hevur harafturat gjørt av at leita sær hjálp frá nøkrum av teimum fremstu DNA-serfrøðingunum í heiminum. Tí hevur løgreglan samband við Forensic Science Services í Birmingham í Bretlandi og rannsóknarstovuna hjá týsku kriminalløgregluni í Wiesbaden, skrivar Aftonbladet.



*Olof Palme. Nú skal frakki hansara kannast.*

Havnar Bio
kall Coca-Cola




The Fog
Týsdag 21.02 kl. 22.00
Mikudag 22.02 kl. 22.00
Hósdag 23.02 kl. 22.00 Seinasta sýning




Fun with Dick & Jane
Týsdag 21.02 kl. 19.30
Mikudag 22.02 kl. 19.30
Hósdag 23.02 kl. 19.30




Lille Kylling
Týsdag 21.02 kl. 17.30
Mikudag 22.02 kl. 17.30
Hósdag 23.02 kl. 17.30




Afsporet
Týsdag 21.02 kl. 19.15
Mikudag 22.02 kl. 19.15
Hósdag 23.02 kl. 19.15 Seinasta sýning




München
Týsdag 21.02 kl. 21.30
Mikudag 22.02 kl. 21.30
Hósdag 23.02 kl. 21.30




Nanny McPhee
Týsdag 21.02 kl. 17.00
Mikudag 22.02 kl. 17.00
Hósdag 23.02 kl. 17.00 Seinasta sýning

KOMANDI FILMUR
Bambi 2 FRUMSÝNING
Fríggjadagur 24.02
Serenity FRUMSÝNING
Fríggjadagur 24.02

www.bio.fo • Telefon 31 19 56
Stórt úrval av DVD-filmum til sølu